# Jólakonsert í Glyvra kirkju

KONSERT

Sunnudagin 11. desember verður konsert í Glyvra kirkju við luttøku av Nes Sóknar Musikkfelag og einari messingkvintett við leikarum úr orkestrinum. Hetta er samskipað av venjaranum hjá NSM, Ken Jones, og hann spælir sjálvur við í hesi kvintett.

Nes Sóknar Musikkfelag er sett saman av spælarum úr bygdunum kring Skálafjørðin og úr Oyndarfirði, og tilsamans eru tey 30 spælarar. Orkestrið spælir regluliga til mong ymisk tiltøk: stevnur, hátíðarhald, konsertir og tendring av jólatrøum.

Á hesi konsertini spælir NSM fyrst helvtina av sínum 10 stykkjum. Síðan spælir messingkvintettin nøkur løg, áðrenn orkestrið spælir sína seinnu helvt. Endað verður sjálvsagt við „Gleðilig jól", har áhoyrararnir fáa høvi at syngja við.

Tónleikurin er mest jólaløg, men harumframt eru 2 Mozart-stykki eisini við: Alleluia, har Áki L. Hansen er solistur á kornett og Rondo úr hornkonsert, har Jóngerð Juul Olsen er solistur á alt-horni.

Konsertin í Glyvra kirkju sunnudagin byrjar kl. 16.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og fyrrapartin ælingur, men seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Um morgunin andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt, men sum frálíður veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk millum útsynning og útnyrðing og mánadagin yvirhøvur turt og sólglottar, men týsdagin okkurt ælið. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Nýggj ferðaætlan til nýggja Smyril

FERÐAÆTLAN

Í sambandi við at nýggi Smyril hevur verið í sigling í hálvan annan mánað, er ferðaætlanin nú endaliga løgd fyri skipið og bussarnar í Suðuroynni.

Fyrra fráferðin hjá Smyrli úr Tórshavn mánadag, hósdag, leygardag og sunnudag er flutt við 15 min. - frá kl. 10.15 til kl. 10.30.

Ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum í Suðuroy, leið 700, 702 og 703, er lagað til siglingartíðina hjá Smyrli. Sum dømi kann nevnast, at fráferðin av ferjuleguni um kvøldið er framskundað við 20 minuttum.

Nýggja ferðaætlanin er lýst í bløðunum, og kemur í gildi fríggjadagin 9. desember.

Ferðaætlanin verður eisini at síggja á heimasíðuni og kann heintast sum faldari á farstøðini, umborð á Smyrli og í bussunum í Suðuroy, siga Strandfaraskip Landsins í tíðindaskrivi.

www.sosialurin.fo

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt stormlágtrýst, 951 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Atlantshavinum á 44N-34V fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum leygardagin við lýggjum veðri.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 2 |
| London | 5 |
| Tromsø | -2 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 15 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | -- |
| New York | 0 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/12 kl. 06⁰⁰– 8/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,4°
Minsti hiti máldur í des.: -10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 7/12 kl. $06^{00}$– 8/12 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í desember: 19,3 mm

**Vika 48 – 4. des.**

1. Centrum:
**71 - 55 - 52 - 48 - 20 - 01 - 31 - 57 - 50 - 74 - 30 - 72 - 53 - 07 - 64 - 68 - 10 - 29 - 15 - 73 - 12 - 03 - 51 - 32**

1. Ramme:
**16 - 28 - 60 - 49 - 04 - 24 - 69 - 67**

Fuld plade:
**02 - 21 - 23 - 39 - 26 - 58 - 17 - 65 - 36 - 27 - 42 - 05 - 38 - 70 - 44 - 43**

Fri spil: **BOX__**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **30.834,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **10.652,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **1.547,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **218,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **19,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 12 úrslit
**Vika 48– 4. des.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AC Horsens - AGF | 1 |
| 2. | FC København - Viborg | 1 |
| 3. | FC Nordsjælland - Brøndby | 2 |
| 4. | Silkeborg - AaB | 2 |
| 5. | SønderjyskE - Esbjerg | 2 |
| 6. | Charlton - Manchester C | 2 |
| 7. | Leverkusen - Hertha Berlin | 2 |
| 8. | Mainz - Wolfsburg | 1 |
| 9. | Fiorentina - Juventus | 2 |
| 10. | Palermo - Cagliari | x |
| 11. | Sampdoria - Empoli | 1 |
| 12. | Udinese - Livorno | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | **61.442,- kr.** |
| 11 rætt: | **2.864,- kr.** |
| 10 rætt: | **290 ,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

5. desember Mánin næstur jørðini
8. desember Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. Des | - | 12.18 | 11.18 | 23.55 | 11.33 | - | 01.41 | 14.18 | 02.41 | 15.18 | 10.33 | 23.10 | 09.33 | 22.10 | - | 12.33 | 00.56 | 13.33 | - | 12.03 | 00.41 | 13.18 |
| 9. Des | 00.55 | 13.31 | - | 12.31 | 00.10 | 12.46 | 02.55 | 15.31 | 03.55 | 16.31 | 11.46 | - | 10.46 | 23.23 | 01.10 | 13.46 | 02.10 | 14.46 | 00.40 | 13.16 | 01.55 | 14.31 |
| 10. Des | 02.08 | 14.30 | 01.08 | 13.30 | 01.23 | 13.45 | 04.08 | 16.30 | 05.08 | 17.30 | 00.23 | 12.45 | 11.45 | - | 02.23 | 14.45 | 03.23 | 15.45 | 01.53 | 14.15 | 03.08 | 15.30 |
| 11. Des | 02.52 | 15.14 | 01.52 | 14.14 | 02.07 | 14.29 | 04.52 | 17.14 | 05.52 | 18.14 | 01.07 | 13.29 | 00.07 | 12.29 | 03.07 | 15.29 | 04.07 | 16.29 | 02.37 | 14.59 | 03.52 | 16.14 |
| 12. Des | 03.37 | 16.01 | 02.37 | 15.01 | 02.52 | 15.16 | 05.37 | 18.01 | 06.37 | 19.01 | 01.52 | 14.16 | 00.52 | 13.16 | 03.52 | 16.16 | 04.52 | 17.16 | 03.22 | 15.46 | 04.37 | 17.01 |

5 707265 100050 >